# Nú tendra tey í Æðuvík



*Hvørt einasta hús í Æðuvík verður pyntað við alskyns ljósum til jóla, og í ár verður neyvan nakað undantak í so máta.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Æðuvík er tiltikin bygd, tá ið tað snýr seg um at pynta til jóla. Ikki minst verður nógv gjørt burtur úr at hava ljósketur og ymiskt annað, ið lýsir, upp at hanga. Sunnudagin verða ljósini tendrað.**

JÓLALJÓS
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Flestallir føroyingar hava frætt um jólahugnan í Æðuvík. Neyvan nakra aðrastaðnis í landinum verður so nógv gjørt burtur úr at pynta við ljósketum og øðrum til jóla, og fólk langvegis frá koma á hvørjum ári til Æðuvíkar at uppliva jólabýin.

### Bjóða øllum til bygdina

Komandi sunnudag, ið er fyrsti sunnudagur í advent, verður ársins jólabýur í Æðuvík tendraður.

Tiltakið sunnudagin byrjar við, at Martin Restorff Jacobsen hevur familjuguðstænastu í Missiónshúsinum í bygdini klokkan 18.

Ein tíma seinni verður jólabýurin tendraður, og tá fer Nes Sóknar Hornorkestur at spæla, og Sæunn Ólavsdóttir Hansen heldur røðu. Somuleiðis verða gløgg og eplaskivur at fáa.

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

**Viðvíkjandi móttøku av aliburturkasti á Kommunalu Brennistøðini**

Tórshavnar kommuna hevur hin 10. november 2005 samtykt at seta fylgjandi reglur í gildi fyri móttøku av aliburturkasti á Kommunalu Brennistøðini:

1. Tikið verður einans ímóti lívrunnum burturkasti frá alivinnuni, sum hevur uppruna í Tórshavnar kommunu.
2. Tikið verður ikki ímóti lívrunnum tilfari beinleiðis frá alibrúkum.
3. Akvakulturvirkið skal lata KB umsókn um loyvi til burturbeining av lívrunnum burturkasti í seinasta lagi 2 arbeiðsdagar áðrenn burturbeiningin er ætlað at fara fram.
4. Saman við umsóknini skal vera flutningsloyvi frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.
5. Flutningsfyritøkan skal hava váttað burturbeiningarloyvi frá KB og flutningsloyvi frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, tá komið verður við burturkastinum.
6. Flutningsakfarið skal kunna vippa burturkastið beinleiðis niður í silo'ina.
7. Bilførarin skal fara væl um, tá ið hann kemur við burturkastinum. Bilførarin hevur ábyrgdina av, at alt burturkastið kemur í silo'ina og at platturin verður spulaður og sóttreinsaður aftaná.



www.torshavn.fo

# Býráðið hækkar játtanina til summararbeiði

**Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2006, sum verður til aðru viðgerð í Tórshavnar Býráð í annaðkvøld, sæst millum annað, at fitt av peningi skal játtast til summararbeiði hjá skúlaungdómum**

SUMMARARBEIÐI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Játtanin komandi ár til slík arbeiði, sum skúlaungdómar taka sær av í summarfrítíðini, skal eftir ætlan verða tvær milliónir komandi ár í mun til eina millión í ár.

### Hava gjørt eitt gott arbeiði

Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at royndirnar frá í ár vísa, at tað er sera stórur áhugi millum skúlaungdómin at fáa eitt slíkt arbeiði í summarfrítíðini, og áhugin verður væntandi minst líka stórur komandi ár.

- Í ár høvdu vit 121 ungdómar, sum arbeiddu hjá okkum í eitt styttri ella longri tíðarskeið í summarfrítíðini, og nú vit ætla at hækka játtanina, verða tey væntandi væl fleiri. Vit royna við hesum at aktivera ungdómin, og tað er ongantíð áður komið fyri, at so stór upphædd er sett av til slíkar uppgávur, sigur Heðin Mortensen.

Borgarstjórin greiðir frá, at tað arbeiðið, sum ungdómar gjørdu í summar, var væl gjørt, og tað er arbeiðið, sum sæst aftur í kommununi.

### Kring alla kommununa

- Tað eru nógv øki í kommununi, ið hava tørv á eini bøtandi hond, og tað kunnu tey ungu so taka sær av. Tað er til dømis gøtur, ið skulu røkjast, fríøki og annað, sum tey ungu kunnu fríðka um, og sum vit øll kunnu gleðast um, sigur Heðin Mortensen.

Borgarstjórin leggur dent á, at peningurin, ið er settur av, verður nýttur kring alla kommununa, og ikki bert í sjálvari Havnini.



*Heðin Mortensen, borgarstjóri, heldur, at tey ungu, ið hava summararbeiði hjá kommununi, gera eitt gott arbeiði, og tað er ein av orsøkunum til, at játtanin til slíkar uppgávur nú væntandi verður hækkað við einari millión.*

*savnsmynd*

## Byggja nýtt røktarheim í Havn

**Tórshavnar Býráð fer á fundi hóskvøldið væntandi at taka undir við einum tilmæli frá fíggjarnevndini um at taka av einum tilboði frá Sp/f Búsetur um bygging av einum røktarheimi við Hoyvíksvegin**

RØKTARHEIM
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er longu nakað síðani, at Tórshavnar Býráð fór undir fyrireikingarnar til at byggja eitt nýtt røktarheim í høvuðsstaðnum.

Tann akutti tørvurin á røktarheimsplássum í Havn er stórur, og tá ið landið hevur pening tøkan til at stuðla slíkum verkætlanum kring landið, helt Tórshavnar Býráð tað verða upplagt at fara undir eitt nýtt heim.

### Pláss fyri 24 búfólkum

Tá ið Tórshavnar Kommuna keypti gomlu marinustøðina, var samstundis gjørt av, at bæði bygningurin og økið kring bygningin skuldu brúkast til frama fyri eldru borgararnar í høvuðsstaðnum.

Kommunan hevur tí kannað, um møguleiki er fyri at byggja eitt røktarheim á økinum, og tað er tað. Metingar siga, at tað ber til at byggja eitt røktarheim við pláss fyri 24 búfólkum á økinum.

Á vári í fjør gjørdi Selmar Nielsen, arkitektur, eitt dispositiónsuppskot fyri býráðið, sum hevur verið til viðgerð í nevnd. Uppskotið varð góðkent, og síðani hevur verið arbeitt miðvíst við hesi ætlan.

Fyri nøkrum mánaðum síðani var arbeiðið at byggja nýggja røktarheimið boðið út høvuðsarbeiðstøku í innbodnari lisitatión, og tá var tað Sp/f Búsetur við Sjúrða Holm, ið hevði lægsta tilboðið, sum var upp á slakar 17 milliónir krónur. Samlaði kostnaðurin av nýggja røktarheiminum verður mettur at verða umleið 28 milliónir krónur við øllum útreiðslum.